# Ikki nóg væl uppmerkt

**Løgreglan í Suðuroy sigur, at tað vóru fleiri viðurskifti, ið spældu inn, tá ið ein bilur við fýra ungfólkum fór út av vegnum millum Øravík og Hov í farnu viku. Millum annað var tað als ikki skeltað, at har var grivið sama dag.**

**ÓHAPP**
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Á politistøðini á Tvøroyri verður sagt, at vegurin er sera smalur, einans 4,7 metrar, har óhappið hendi. Tá ið so tveir bilar møtast, sum í hesum førinum, verður í hvussu so er annar bilurin noyddur út í annan vegjaðaran. Í hesum førinum var tað Simona Jensen.

### Lá nógv runa

Tað var nakað av runu á vegnum frá arbeiðinum upp á Hovstunnilin, og úti í vegjaðaranum var heilt fitt av runu, tí har høvdu menn grivið sama dag. Tá ið Simona Jensen kemur út í vegjaðaran, fer bilurin á glið, og hon megnar ikki at rætta upp aftur. Bilurin fer útav, og hann bóltar tvær ferðir runt, sigur Johannes Magnussen, løgreglumaður í Suðuroy, sum hevur havt málið um hendi. Johannes Magnussen sigur, at tað var als einki skelti, sum segði frá, at har var grivið sama dag, og tað er ikki nøktandi.

Hann sigur, at Ístak, sum hevur arbeiði av at gera Hovstunnilin, frá byrjan av hevur fingið boð um at sópa landsvegin fyri runu hvørt kvøld, og tað hevur eisini verið gjørt. Síðani óhappið hevur tað tó verið álagt Ístak, at vegurin nú skal spulast hvørt kvøld, og hesi boð hava eisini verið fylgd, sigur Johannes Magnussen.

- Tað er tó harmiligt, at tað skal henda eitt óhapp, áðrenn vit koma har til, at boð verða givin um at spula vegin dagliga, sigur løgreglan í Suðuroy.



*Simona Jensen stendur og hyggur at sínum knústa Peugeot 306. Alt er farið í knús á bilinum, men er er takið lyft uppaftur. Fólk, sum sóðu tilburðin, ivaðust ikki í, at onkur doyði, so ógvusligt sá tað út*

# Eitt undur at vit sluppu livandi frá tí

**Tað var eitt satt undur, at øll sluppu livandi frá tí, tá ið ein biltúrur hjá fýra ungum fólkum í Suðuroy endaði á sjúkrahúsinum, tá ið hann akkurát tað sama kundi enda nógv verri**

**ÓHAPP**
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Klokkan gott níggju seinasta mikukvøld kom ein bilur við fýra ungum fólkum, koyrandi eftir landsvegnum ígjøgnum Tjaldavík ímillum Øravík og Hov í Suðuroy. Tað vóru tveir dreingir og tvær gentur í bilinum. Akkurát hesa løtuna kundu tey ikki vita, at tað nøkur sekund seinni má sigast at vera eitt satt Guds undur, at tey enn vóru øll á lívi.

– Vit komu koyrandi norðureftir, tá ið vit møttu øllum bilunum, sum komu av Smyrli og skuldu suðureftir, greiðir 19 ára gamla Simona Jensen frá, sum sjálv átti og koyrdu bilin. ein reyðan Peugeot 306.

Fyri at geva pláss fyri bilunum av Smyrli, slakaði hon av og fór út í síðuna, so at bilarnir kundu koyra framvið.

Men tá hendi tað, sum allir bilførarar kunnu fáa marruna av: Bilurin misti fullkomiliga sambandið við vegin, so at bilførarin fullkomiliga misti harradømið á honum.

– Tað gjørdi ikki mun, hvat eg gjørdi, tí bilurin hvørki bremsaði ella snaraði. Eg merkti bara, hvussu hann fór longur og longur út í síðuna. Eg royndi av øllum alvi at stýra honum uppaftur á vegin, men tað gjørdi ikki mun, tí bilurin bara sigldi á vegnum.

Eftir hetta minnist Simona ikki so nógv.

Men eygnavitni siga, at bilurin fór útav bakkanum og rendi gronina veint í ein stóran stein. Eftir hetta koppaði hann framyvir á takið og rullaði einar tríggjar fýra ferðir runt. Tá ið bilurin steðgaði, lá hann á vinstru síðu. Tá vóru rútarnir brotnir og Simona lá hálv út ígjøgnum vinstra forrút við bilinum omanyvir sær. Men tað eydnaðist hinum, sum vóru við, at koppa bilinum omanav henni.

Eitt minnist Simona afturat frá sjálvum óhappinum. Tað var tá ið bilurin rakti steinin og luftpútan blástust upp og hon fekk hann beint í andlitið. Hinumegin hevði bilurin eisini luftpútu og eisini hann blástist upp í andlitið á tí, sum har sat.

Aftaná eru tey sannførd um, at tað var luftpútunum fyri at takka, at tey sluppu so væl frá óhappinum, tí teir tóku stoytin. Hevði bilurin ikki havt luftpútur, eru tey í øllum førum greið yvir, at skaðin hevði verið nógv verri.

### Steinrunnin

– Vit royndu at rópa eftir hjálp, men tað var ikki stór reaktión uppi av vegnum, hóast nógv fólk í bilunum frá Smyrli stóru og hugdu at, sigur Simona.

Hon sigur, at aftaná hevur hon fingið at vita, at tey, sum stóðu uppi á vegnum, ivaðust ikki í at onkur var deyður, so ógvusligt var óhappið. Tí tordu tey rætt og slætt ikki oman av ótta fyri, hvat bíðaði teimum og stóðu mestsum runnin í stein.

Boð vórðu tó send eftir sjúkrabilum og løgreglu og øll fýra fólkini vórðu send á Suðuroyar Sjúkrahús, men kanningar vístu, at ongin hevði meiðslað seg illa. Skurðsl, smásnuddir og eymleiki í vøddum og liðum var einasta mein, tey fingu, so tað var ótrúliga væl sloppið.

Bilurin hann er vrak og verður ikki gjørdur aftur. Alt er brotið í bilinum, sjálvt motorurin er farin í knús av stoytinum.